Kirkju:

# andi



*Kórini og Eivør fingu á ein serligan hátt tað allarbesta fram í hvørjum øðrum*

sum tey flestu uttan iva høvdu væntað. Tess meir fjøllbroytt var framførslan, sum fevndi líka frá negro spirituals, við Eivør sum solisti, og sálmar hjá Brorson til íblástur frá gomlum skjaldrum og Gleðilig Jól. Men kórið slapp ikki so, og eftir rungandi lógvabrestir, máttu teir aftur á pallin. Av tí at kórið ikki hevði vant so nógv saman við Eivør, sungu tey frálíka lagið "Nobody Knows" umaftur, og prógvaðu enn einferð, hvat kórsangur kann, tá tann er allarbest.

Kórini, Eivør og Pætur verða aftur at hoyra í Vesturkirkjuni mikukvøldið kl. 20.00.





## Eivør og kór Vesturkirkjuni

Mikukvøldið kl. 20 fáa Havnafólk og onnur eisini høvi at hoyra Tórshavnar Manskór, Felagskórið Gøta/Leirvík, Eivør og Pætur við Keldu syngja jólini inn. Konsertin er ein endurtøka av væleydnaðu konsertini, sum var hildin í Gøtu Kirkju seinasta sunnudag.

Felagskórið Gøta/Leirvík byrjar konsertina við at syngja nakrar traditionellar kórsangir, sum fyri tað mesta hoyra jólunum til. Eisini syngur Eivør við sum solistur á einum av sangunum.

Síðani syngur Eivør nakrar sangir sjálv, væl stuðla av Pæturi við Keldu á klaveri, umframt at tey bæði eisini fara at syngja eina duett. At enda syngur Tórshavnar Manskór nakrar sangir, har Eivør verður við sum solistur í tveimum av sangunum.

**-ave-**